LM-099/2023

Annika Petersen

Fylgiskjal 95

Fra: Joanna Djurhuus
Sendt: 5. marts 2024 15:43
Til: Annika Petersen
Emne: Burðardygg ferðavinna

Fra: Búi Tórgarð Brattaberg <bui.torgard.brattaberg@skulin.fo>
Sendt: 1. marts 2024 11:49
Til: Joanna Djurhuus <JoannaD@uvmr.fo>
Emne: Burðardygg ferðavinna

Eg vil hervið gera vart við, at Handanáhagi hagi í Mykinesi er nú allur stikaður inni við hegni og píkatráði. Hesin er 5 merkur og 4 gyllin festijørð umframt hálvfjórða gyllin av ognarjørð. Haldi hetta er ógvuliga ósømuligt. Har er **ein** smoga at fara ígjøgnum. Tær gomlu gøturnar til Eingilsmannahúsið (fornminni) og annars gøtur inn í Goðsdal, Íralíð og á Borgardal eru avstongdar. Hagin Handaná matr. 172 b Mykines er sum sagt hegnaður við píkatrái. Lógin fyriskrivar, at tú kannst nýta píkatrá um tað er fyri stórdýrum neyt og hestar. Í verandi løtu eru eingi stórdýr í Mykinesi. Sjálvandi skulu ferðafólk ikki ganga óskipað og mala "allastaðni" uttan ferðaleiðara, men at tað ikki sleppst til t.d. Eingilsmannahúsið, ið er at meta sum eitt fornminni, uttan at ein skal noyðast uppum píkatrá, er ikki í lagi. Um hetta verður loyvt, kemur píkatráður aðrastaðni eisini!! Hetta verður hervið tykkum til kunningar.

Víðari kann je leggja aftrat, at je kunnaði sýslumannin Kristian Martin Joensen um málið, tá hegningin var í gongd. Hann ætlaði at fáa tað viðgjørt á grannastevnu í 2023, men hon bleyv avvlýst !!

H. Búi Tórgarð Brattaberg.